UTTAN ÚR HEIMI

# Noreg aftur virkið í Miðeystri



*Kjell Magne Bondevik, norski forsætirmálaráðnarrin, hevur fingið bræv frá Yassir Arafat, sum biður hann hjálpa sær í stríðnum í Miðeystri*

*Mynd: Jan Müller*

**Norska stjórnin hevur enn einaferð fingið ein virknan lut sum millummaður í Miðeystri.**

ÚTLAND
*Fartekst*

Tá norski forsætisráðharrin, Kjell Magne Bondevik, í gjár fór á fund við amerikanska forsetan, George W. Bush, var tað ikki einans sum norskur stjórnarleiðari, at hann hitti amerikanska forsetan.

Stutt undan fundinum hevði Kjell Magne Bondevik sitið á norsku sendistovuni í Washington og tosað í telefon við ísraelska forsæltisráðharran, Ariel Sharon. Evnið var eitt bræv, sum Bondevik hevði fingið frá palestinska leiðaranum, Yasser Arafat, har hesin bað norska forsætisráðharran royna at ávirka Bush, so teir palestinsku myndugleikarnir kundu fáa betri stundir til at handtaka teir, sum hava skipað fyri atsóknunum í Ísrael í seinastuni.

Í brævinum skrivaði Arafat, at hann var til reiðar at eftirlíka ísraelska og amerikanska kravinum um at fongsla teir seku, men at tey áhaldandi ísraelsku álopini gjørdu hetta ómøguligt. Arafat hevði eisini eini beinleiðis boð til George W. Bush í brævinum, men einki er sagt um, hvat tað var.

Kjell Magne Bondevik hevur fyrr sagt, at Noreg er til reiðar at virka sum millummaður í Miðeysturkreppuni - eina ferð enn.

Líkt er til, at partarnir hava tikið hann upp á orðið.

# Skipasmiðjurnar fáa ikki stuðul



**Eitt uppskot hjá ES-nevndini um at lata skipasmiðjunum stuðul í kappingini við suðurkoreansku skiðasmiðjurnar vinnur ikki frama**

ÚTLAND
*Fartekst*

Tað var belgiski handilskommiserurin, Pascal Lamy, sum hevði skotið upp, at ES skal veita sínum skipasmiðjum fíggjarligan stuðul, so tær kunnu standa seg í kappingini við skipasmiðjurnar í Suðurkorea, sum fáa munandi stuðul frá tí almenna.

Men uppskotið vann ikki frama millum politikarar nar.

Tað vóru serliga Týskland og Spania, sum tóku undir við uppskotinum um stuðul til skipasmiðjuídnaðin, meðan lond sum Bretland, Holland og Danmark vóru ímóti.

ES-nevndin ætlaði at seta stuðulin í gildi, men at ES samstundis skuldi senda handilssamgonguni WTO eina kæru um tann suðurkoreanska stuðulin. Men hesum vildu ráðharrarnir ikki taka undir við. Teir halda, at nevndin kann kæra Suðurkorea uttan at seta stululsskipanina í gildi.

Í danska skipasmiðjuídnaðinum eru teir væl nøgdir við, at stuðulsskipanin varð vrakað. Sagt verður, at ein tílík skipan hevði verið ymisk í teimum einstøku londunum í ES, og at stuðulin tí hevði avskeplað kappingina.

# Búskaparkreppa í Argentina

**Argentinska stjórnin leitar eftir pengum til at gjalda tær nógvu rokningarnar, sum liggja og bíða**

ÚTLAND
*Fartekst*

Stjórnin í Buenos Aires hevði vónað, at altjóða gjaldoyragrunnurin IMF fór at játta landinum eitt lán afturat, men seint í gjárkvøldið svaraði grunnurin, at hann er ikki sinnaður at læna Argentina meiri pengar.

Hesaferð hevði argentinska stjórnin søkt um góðar tíggju milliardir krónur. Avgerðin hjá grunninum ber í sær, at tann sera vánaligi búskapurin nú verður uppaftur verri fyri.

Argentinski tjóðbankin hevur boðað frá, at tað kann gerast neyðugt at loysa virðið á landsins gjaldoyra, pesos, frá amerikanska dollaranum. Virðið á argentinskum partabrøvum fall, tá tað frættist um avgerðina hjá IMF, og altjóða búskaparfrøðingar siga, at nú er vandi fyri skrædli í triðistørsta latínamerikanska búskapinum.

Argentinska uttanlandsskuldin er í dag umleið 1100 milliardir krónur. Tað merkir, at hvørt mansbarn í landinum skyldar umheiminum meira enn 30.000 krónur. Seinastu dagarnar hava nógvir argentinar valt at tøma sínar bankabøkur, tí fólk bera ótta fyri, at bankarnir fara á húsagang. Mánadagin noyddist stjórnin at seta mark fyri, hvussu nógvar pengar fólk kunnu taka út. Tá høvdu fólk tikið næstan tíggju milliardir krónur út eftir einum samdøgri.



# Nadia Mazzoni sýnir fram í Smiðjuni í Lítluvík



*Nadia Mazzoni sýnir á øðrum sinni fram í Smiðjuni í Lítluvík*

LISTAFRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Í dag, 7. desember, letur Nadia Mazzoni upp aðru listaframsýning sína í Smiðjuni í Lítluvík. Á framsýningini eru 26 verk, øll frá í heyst.

Í mun til fyrstu framsýningina, har einasta tøknin var akryl, er spennivíddin hesa ferðina størri. Tey nýttu tøknini, olja, kol og tusj, eru øll samansjóðaði í ymsum samansetingum. Tað nýtta tilfarið hevur ment seg frá lidnum til sjálvgjørt tilfari, líka frá løriftum og rammum til sjálva oljumálingina, ið er tilvirkað av litevnum og olju, eins og tey gjørdu í Miðøld. Tað er eisini í tí sjálvgjørda, at tað serstaka er í hesi framsýningini, allar plátur og rammur eru gjørdar úr óruddi funnið í Havnar gøtunum.

Menniskjan verður sett í miðdepilin í hesi framsýningin, menniskjakroppurin, skapið av kroppinum og kenslunum, sett í ymsk umhvørvi. Av hesum er úttrykki skiftandi, sensuelt, óneyvt og mjúkt ella hart og ágangandi – bæði í formi og liti. Í møtuni millum hesi verður rúmd og dynamikkur skapaður.

Nadia er fronsk og fødd í 1971 í Lund í Svøríki. Fyri hálvum øðrum árið síðani segði hon seg úr starvið sum lærari og flutti til Føroyar at mála. Hon hevur verið við í trimum felagsframsýningum: Tvær í Svøríki og eina í Havn. Listarliga virksemi hennari hevur áður fyrst og fremst verið innan sjónleik, sum sjónleikari t. d. á Malmølistastevnuni, men m. a. eisini sum model fyri modernaðum svenskum listafólkum og í reklamum, og sum upplesari á Malmø Altjóða Yrkjarastevnuni.

Framsýningin letur upp kl 12 í dag, og er opin hvønn dag frá kl 12 til 18 til týsdagin tann 11. desember.

## Trølla Pætur í biograf

**Ísambandi við at filmurin »Hvar er Nósi?« kemur í handlarnar leygardagin, verður filmurin frumsýndur í Havnar Bio fríggjadagin**

TRØLL
*Tíðindaskriv*

Nýggjur føroyskur barnafilmur við Trølla Pæturi, Trølla Ommuni, Erling Politisti og Kulum Rótum kemur á marknaðin leygardagin. Í hesum sambandi verður nógv gjørt burturúr. Sum nakað heilt nýtt verður filmurin frumsýndur í Havnar Bio. Íalt verða tríggjar sýningar, og hesar verða allar fríggjadagin. Tann fyrsta verður kl. 15.00, tann næsta kl. 16.15 og tann síðsta kl. 17.30.

Trølla Pætur og Omman fara at bjóða vælkomin og at heilsa uppá øll tey vitjandi. Leygardagin kl. 10.00 signera omman og Trølla Pætur filmin í Elding í SMS, og klokkan 12.00 verða tey at hitta í Elding í Saltangará. Mánadagin kl. 16.00 vitja trøllini deildina hjá Elding í Klaksvík.

Mánakvøldið og týskvøldið kl. 19.00 kunnu norðoyingar síggja filmin í mentunarhúsinum í Atlantis, sum nýliga er latið uppaftur.

Nýggi og hendingaríki filmurin er innspældur í Føroyum og í Grønlandi. »Hvar er Nósi« er 50 minuttir langur, og innihaldið er hóskandi fyri alla familjuna.


## Programmedarbeiðari

Starv sum programmedarbeiðari í Útvarpi Føroya er leyst at søkja. Starvið verður at seta skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu.

Tann, sum settur verður, skal arbeiða í programmedarbeiðarabólkinum við tíðindum og øðrum sendingum. Arbeiðið er skipað í vaktum við skiftandi arbeiðstíðum.

**Krøv til umsøkjaran:**
- útbúgving sum journalistur, journalistiskar royndir ella aðra relevanta útbúgving
- góðar fyritreytir fyri at arbeiða við teldu
- góð evnir at orða seg skrivliga og munnliga

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi og áhugavert arbeiði í einum umhvørvi, sum er í skjótari tøkniligari menning
- eitt umhvørvi, har vit leggja dent á persónliga menning
- eitt sjálvstøðugt arbeiði

**Vit ynskja:**
- at tær dámar at arbeiða í skiftandi vaktum, eisini uttanfyri vanliga arbeiðstíð
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, og eisini hevur góð evnir at samstarva í bólki
- at tú dugir at loysa trupulleikar, tá á stendur
- at tú hevur góð samstarvsevni og kann geva íkast til menning av arbeiðsplássinum
- at tær dámar at skapa nakað sjálv/ur
- at tú hevur útvarpsrødd

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambart sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir skulu vera útvarpinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. desember 2001.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jógvan Jespersen.

ÚTVARP FØROYA

**Útvarp Føroya**
Postboks 328
110 Tórshavn
Tlf. 316566



